## Stórsigur hjá AB

Talan gjørdist um eina vældeydnaða útferð hjá AB, sum í gjár vann 5-1 á útivølli móti Skive. Hálvleiksstøðan var 1-0 til AB. David Boysen var tann stóra hetjan hjá AB í dag, hann skeyt hattrick í dag. Hini málini hjá AB skutu Klaus Lykke og Simon Bræmer. Christian Høgni Jacobsen, sum er sáttmálabundin við AB, var ikki á vøllinum í dystinum.

## Southampton misti 10 stig

Fríggjadagin gjørdist tað greitt, at Southampton, sum í mong ár var í bestu ensku fótbóltsdeildini, má flyta niður í triðbestu deildina, sum nevnist League One. Holdingfelagið aftanfyri Southampton hevur seinastu tíðina verið undir umsiting. Sjálvt um felagið hevur roynt at greitt enska fótbóltssambandinum frá, at felagið og holdingfelagið eru tvey ymisk ting, so eru tey í enska fótbóltssambandinum ikki samd við hesum. Tey meta, at Southampton og holdingfelagið eru partur av einum og sama fíggjarroknskapi. Enska fótbóltssambandið hevur givið Southampton eina revsing, sum ger at teir missa 10 stig. Southampton hevur eina skuld, sum liggur omanfyri 20 miljónir bretsk pund.

EB/Streymur-NSÍ 3-4 (0-1):

# Potemkin stungið vespurnar á odda

**Eftir eina sanna málveitslu, har NSÍ størsta partin av dystinum lá greitt omaná, er liðið nú fremst í bestu deildini. Vespan við hvassasta broddinum, Karoly Potemkin, stakk heilar tríggjar ferðir og Einar Hansen skeyt eitt gott mál. So tað munaði lítið, at EB/Streymur fekk trý mál**

*EB/Streymur*

*NSÍ*

FÓTBÓLTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hóast EB/Streymur er eitt lið, sum má liva við favoritleiklutinum allar dystirnar við Margáir, so ætlaðu vespurnar hjá Paula Poulsen ikki, at gevast uttan stríð.

Næstan allan dystin var bólkurin úr Runavík omaná, tá teir alla tíðina løgdu press á verjuna hjá heimaliðnum. Hetta hevði við sær, at EB/Streymur hevði nógv bólttap á miðjuni, meðan verjuleikararnir týðiliga kendu seg illa, tá Bogi Løkin, Hjalgrím Eltør og Karoly Potemkin alla tíðina royndu at prika bóltin frá EB/Streymi, og tað riggaði eisini væl. Hetta hevði fyri tað mesta við sær, at verjuleikararnir royndu at gyppa bóltin frameftir, og tí fekk EB/Streymur fá góð álop.

Tó so, EB/Streymur spældi seg fram til nakrar møguleikar, men tað var púragreitt, at NSÍ alla tíðina var eina vespulongd frammanfyri.

### Potemkin í hopla

Skal ein leikari á vøllinum nevnast, so má tað vera Karoly Potemkin, sum takkaði fyri tíðina hann vandi við Margáir, við at skjóta trý mál. Nú er hann komin fram á fimm mál fyri tveir dystir, og tað er nakað síðan, at nakar leikari hevur gjørt tað.

Tvey av málunum fekk ungarski áloyparin við høvdinum eftir vánaligt verjuspæl, og tað sást eisini væl, at Gunnar á Steig, sum vardi málið fyri EB/Streym, ikki er líka sterkur í luftspælinum, sum nógvir aðrir málmenn.

Seinasta málið fekk ungarin eftir eitt sera gott gjøgnumbrot hjá Hjalgrími Elttør, sum serveraði bóltin fyri føturnar hjá Potemkin, sum takkaði fyri og skeyt sigursmálið í dystinum.

### Ferð á seinna hálvleiki

Í fyrra hálvleiki, sá dysturin út, sum flest aðrir. Nakað av spæli var, men tað taktiska hevði munin og tað fantastiska var ikki at síggja.

Men ímóti endanum á dystinum broyttist hendan myndin. Heili 4 mál vórðu skotin seinastu 20 minuttirnar, og verulig ferð var á.

NSÍ vísti besta spælið, meðan EB/Streymur megnaði nøkur fantastiskt ting upp á deyðbóltar. Har millum annað Bárður Olsen skeyt eitt fríspark úr einum 35-40 metrum. Tað sá út sum, at Meinhard Joensen, í málinum hjá NSÍ hevði stýr á støðuni, men áðrenn mann visti av, sang bólturin í netinum aftan fyri hann. Málmaðurin sá eitt sindur nipin út, men helst hevur bólturin broytt kós beint frammanfyri Meinhardi Joensen.

Hetta kundi verið ein kandidatur til ársins mál.

Men tað eru ikki bara EB/Streymur, sum dugir at skjóta fríspørk. Einar Hansen hjá NSÍ fekk somuleiðis møguleikan. Hann var einar 25 metrar frá málinum, tá hann smekkaði eitt rættiliga flatt skot framvið múrinum. Gunnar á Steig rakk ikki út til bóltin, og so hevði Einar Hansen skorað.

### Brotsspark

Einar 10 minuttir fyri leiklok fekk NSÍ brotsspark. Eftir gott pressspæl frá vespunum var Egil á Bø farin av sínum plássi, og royndi at spæla ein bólt frameftir. Hendan bóltin fangaðu runavíkingar skjótt, og Bogi Løkin varð spældur leysur. Hann setti málmannin av, men innanfyri Gunnar á Steig stóð Marni Djurhuus. Bogi Løkin skeyt bóltin móti málinum, og onkursvegna rakti bólturin Marna Djurhuus á armin.

Páll Augustinussen, sum annars dømdi ein góðan dyst, dømdi brotspark, hóast tað er torført at síggja, hvussu stóra skuld Marni Djurhuus hevði av, at bólturin kom á armin. Sum eitt plástur á sárið gav dómarin ikki reytt kort.

Tað kann hugsast, at Nemus Djurhuus, dómaraeygleiðari, hevði onkra heilsan til Páll Augustinussen um hendingina.

### NSÍ fremstir

Sum úrslitini lagaðu seg í gjár, endaði tað við, at Pauli Poulsen, Karoly Potemkin og restin av vespunum liggja á odda við 10 stigum, og eru samstundis einasta ósigraða liðið.

EB/Streymur sær hinvegin ikki út til at vera ført fyri at liva upp til tað, ið tey flestu væntaðu frá meistarunum, ið tey flestu mettu hava eitt sterkari lið í ár, enn í fjør.



*EB/Streymsleikararnir stóðu bara og hugdu at, meðan Einar Hansen og restin av vespunum vunnu dystin við Margáir*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

## Hugsa ikki um plássið

NSÍ liggja í verandi løtu á odda í Vodafone Deildini, men tað er ikki nakað, Pauli Poulsen hugsar so nógv um.

- Vit hugsa ikki so nógv um, hvar vit liggja, vit royna bara at vinna okkara dystir, segði hann, og ljóðaði ikki sørt sum Óli Hansen, liðskipari, sum gjøgnum alt 2007 tosaði um ein dyst á gangin.

Pauli Poulsen metir somuleiðis, at NSÍ vóru betra liðið tað mesta av dystinum og fegnast, at liðið megnaði at spæla so væl.

Karoly Potemkin hevur higartil fingið fimm mál í ár, og hetta fegnast venjarin um.

- Hann hevur havt nakrar góðar dystir, og kemur best at hava nakrar afturat, segði Pauli Poulsen.

## Vóru ov dovnir

Sigfríður Clementsen, venjari hjá EB/Streymi, er ikki nøgdur við spælið hjá EB/Streymi um vikuskiftið.

- Vit vóru alt ov leysir í markeringunum, og vildu ikki nóg nógv, greiddi hann frá eftir dystin.

Hinvegin vil hann ikki veruliga gera viðmerkingar til vantandi stigini.

- Tað ber altíð til at spyrja, um tað er nøktandi, at vit bara hava helvtina av stigunum, men tað fyrsta vit mugu gera, er at fáa skil uppá hugburðin og spælið, segði Sigfríður Clementsen, sum ikki var nakað serliga væl nøgdur í gjár.